Løgmansskrivstovan

Dagfesting:	16.08.2022
Mál nr.:	21/23705
Málsviðgjørt:	SR
Ummælistíð:	24. mai – 24. juni 2022
Eftirkannað:	30. juni 2022

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum
(Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 151 frá 12. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

"**(Ræðislógin)**"

2. § 1, stk. 2, nr. 7 verður orðað soleiðis:

"7) Heilsumál, læknar, jarðarmøður, sjúkrahús, tó ikki farsóttarmálsøkið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 1. mai 2023.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í tíðini undir korona hevur tað víst seg at hava avbjóðingar, at farsóttarmálsøkið er á donskum hondum. Tá ið ein farsótt herjar, skulu skjótar avgerðir takast. Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur tí fyri landsstýrinum ført fram, at neyðugt er, at avgerðarmyndugleikin í farsóttarmálum er tætt uppá, har avgerðir verða tiknar, nevniliga á føroyskum hondum. Landsstýrið hevur viðgjørt málið og er samt um, at hetta er rættasta leiðin at ganga. Tí verður uppskot um at yvirtaka farsóttarmálsøkið lagt fyri Løgtingið.

1.2. Galdandi lóggáva

Í lóg nr. 11 frá 31. mars 1948 um heimastýri Føroya er á lista A nr. 4 nevnt sum mál, sum kann yvirtakast av føroyskum myndugleikum:

> "Heilsumál, læknar, jarðamøður, sjúkrahús, apotek. Harundir hoyra embætislæknarnir, kvakksalvaralóggáva, skipanir móti tuberklum og øðrum smittandi sjúkum, sinnissjúk, vaccinering."

Málsøkið apotek varð yvirtikið longu tann 13. mai 1948. Danska Innanríkisráðið hevur í 1985 tulkað hesa yvirtøkuna til, umframt apoteksrakstur, eisini at fevna um eftirlit við heilivági, heruppií eftirliti við heilivágsframleiðslu og góðsku.

Aðrir partar av heilsumálsøkinum eru ikki formliga yvirtiknir.

Raksturin av sjúkrahúsverkinum, og heilsuverkinum uttanfyri sjúkrahúsverkið, taka føroyingar sær av sbrt. heimastýrislógini § 9. Fyri at taka sær av hesum rakstri fáa føroyingar árligan blokkstuðul, sum upprunaliga er ásettur sbrt. eini avtalu frá 20. mars 1987 millum landsstýrið og donsku stjórnina og ásettur við serligari ríkislóg á hvørjum ári. Sbr. ríkislóg nr. 316 "af 17. maj 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne § 1", verða reglur ásettar við løgtingslóg um raksturin av sjúkrahúsverkinum og heilsuverkinum uttanfyri sjúkrahúsverkið.

Í avtaluni frá 20. mars 1987 sæst, at § 9 yvirtøkan eisini fevnir um at taka sær av rakstarútreiðslunum av "Epidemi, vaccinationer og kønssygdomme". Sbrt. hesum bera føroyingar tí tær útreiðslur, sum standast av tiltøkum móti smittandi sjúkum sbrt. § 28, stk. 1, í "anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme".

Við løgtingslóg nr. 79 frá 12. mai 2005, um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, er heimastýrisskipanin frá 1948 vend við. Alt kann nú yvirtakast, uttan tað sum nevnt er í lógini § 1, stk. 2. Fyri at skapa greidleika hevur Løgtingið við løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum gjørt av, at alt, sum kann yvirtakast eftir yvirtøkulógini, er yvirtikið, uttan tað sum nevnt er í ræðislógini § 1, stk. 2. Framtíðar yvirtøkur fara tí fram við at strika ella broyta undantøkini. Í ræðislógini § 1 stk. 2 nr. 7 er nevnt sum ikki yvirtikið øki: Heilsumál, læknar, jarðamøður, sjúkrahús. Í ræðislógini er útgreiningin av økinum í heimastýrislógini lista A nr. 4 ikki uppafturtikin, men hon verður tulkað uppí orðingina í nr. 7.

Eftir yvirtøkulógini § 2 stk. 2 gera føroyskir myndugleikar av, eftir tinging við danskar myndugleikar, nær mál og málsøki á lista I í fylgiskjali lógarinnar verða yvirtikin. Sbrt. § 2 stk. 3, skulu hesi málsøki yvirtakast sum ein samlað eind. Heilsumálsøkið stendur ikki á lista I.

Øvugt ásetur yvirtøkulógin § 2, stk. 1, at hini málsøkini nýtist man ikki formliga at tingast við danir um, áðrenn yvirtøka verður framd. Hesi málsøki nýtast ikki at yvirtakast sum ein eind.

Sostatt er onki til hindurs fyri, at føroyskir myndugleikar gera av at yvirtaka ein part av heilsumálsøkinum – farsóttarmálsøkið. Tað er tað økið, sum í heimastýrislógini listi A nr. 4 verður lýst sum "skipanir móti tuberklum og øðrum smittandi sjúkum, vaccinering". Neyðugt er ikki við eini formligari yvirlýsing um, at yvirtøkutingingar eru endaðar, og hvat ið úrslitið gjørdist av teimum.

Hóast tað ikki er neyðugt at hava formligar yvirtøkutingingar við danir, áðrenn yvirtøkan verður framd, hava fundir verið ímillum Heilsumálaráðið, Sundhedsministeriet og Landslæknan um lógaruppskotini. Hetta fyri at umrøða, hvar markið skal ganga ímillum føroyskar og danskar myndugleikar eftir yvirtøkuna. Lógaruppskotini eru tillagað eftir hesum hoyringarfundum.

1.3. Endamálið við uppskotinum og skilmarking millum føroyskt og danskt málsræði

Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka farsóttarmálsøkið. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar, sambært lóg nr. 79 frá 12. mai 2005, um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka lóggávuvaldið og útinnandi valdið á nevnda málsøkið.

Farsóttarmálsøkið fevnir m.a. um – men ikki bert– tey viðurskifti, sum umrødd verða í "anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme" og teirri í Danmark galdandi lóg á økinum. "Lov nr. 285 af 27. februar 2021 om epidemier m.v. (epidemiloven)".

Farsóttarøkið fevnir sostatt um øll tey viðurskifti í tí føroyska samfelagnum, sum kunnu verða ávirkað av einari farsótt, um so er, at tey ikki verða flokkað undir eitt annað málsøki, sum ikki er yvirtikið. Hetta fevnir eisini um tey viðurskifti, sum ikki longu eru lagað eftir galdandi fyriskipan.

Hetta fevnir fyri tað fyrsta um flokking av sjúkum, herímillum meting av og avgerð um, hvørt ein sjúka skal verða fevnd av og lagað eftir føroyskari farsóttarlóggávu.

Hetta fevnir eisini um ábyrgdina av, hvussu smittandi sjúkur skulu kannast og viðgerðast, og um tað skal koppsetast, um so er eisini, hvat koppingarevni skal nýtast. Eftirlit við tí fakliga virkinum hjá heilsustarvsfólkunum í hesum sambandi hoyrir tó enn til danskar myndugleikar.

Yvirtøkan fer eisini at fevna um møguleikan at áseta reglur í løgtingslóg og áseta sokallaðar "ferðslureglur" í sambandi við smittandi sjúkur fyri at fyribyrgja, at fleiri verða smittað.

Við hesum er at skilja, at ítøkiligar fyriskipanir kunnu setast í verk fyri einstaklingar, herundir m.a. avgerðir um avbyrging við tvingsli, viðgerð, kanning og innlegging.

Hetta er eisini galdandi í mun til tær meira samfelagsrættaðu fyriskipanirnar, herundir t.d. at lóggeva og áseta avmarkingar fyri ella banna atgongd til ella nýtslu av viðgerðar-, røktar- og umsorganarstovnum o.a., innandura ella uttandura almennir stovnar, fasilitetir o.a., almenn og privat dagtilboð, skúlar og aðrir útbúgvingarstovnar, hølir og øki, sum fysiskir ella løgfrøðiligir persónar ráða yvir, har sum tað almenna hevur atgongd til og flutningstól og møguleikan fyri smittufyrbyrgjandi tiltøkum í tí almenna rúminum.

Harumframt er hetta eisini galdandi í mun til forboð ímóti, at fleiri persónar eru savnaðir á sama stað, forboð fyri at vera á ávísum støðum og reglur um at avbyrgja øki.

At enda fer tað at fevna um fyriskipanir ímóti innførslu av sjúkum til Føroya.

Yvirtøkan fer eisini at fevna um fyriskipanarlig viðurskifti til at handfara farsóttir og smittandi sjúkur, herímillum at røkja uppgávur hjá myndugleikanum.

Tann 1. januar 2023 verður Fólkaheilsustýrið sett á stovn, sum fer at yvirtaka eina røð av uppgávum frá teimum donsku myndugleikunum. Hetta fevnir m.a. um móttøku av fráboðanum og frágreiðingum viðv. smittandi sjúkum og smittuuppsporan. Tá teir føroysku myndugleikarnir fara at yvirtaka farsóttarmálsøkið, fara tað at vera markamót í sambandi við málsøki, sum enn ikki eru yvirtikin. Arbeiðsuppgávurnar á farsóttarøkinum eru millum annað tætt knýttar at arbeiðsuppgávunum hjá løgregluni, tí løgreglan handhevjar tær reglur, sum myndugleikarnir skriva út, sum t.d. á farsóttarøkinum.

Tað er vanligt, at danskir myndugleikar fyrisita málsøki, sum eru yvirtikin av Føroyum. T.d. handhevjar fútin reglur á ferðsluøkinum, líkasum Landslæknin vísandi til § 212 a í anordning nr. 821 af 22. juni 2018, om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, gevur teimum føroysku myndugleikunum vegleiðing í "reinføri, umhvørvi og sosialmedisini". Landslæknin er eisini limur í Færøernes Sterilisationsnævn, hóast økið gjørdist partur av teimum føroysku myndugleikunum saman við persóns-, familju- og arvarætti í 2018.

Tað er ætlanin, at fútin eins og landslæknin eftir yvirtøkuna framhaldandi skulu vera limir í farsóttarnevndini.

Yvirtøkan fer ikki at fevna um líkskoðan, líkkanning og tað rættarlæknafrøðiliga økið.

Heimild til at lóggeva um, at borgarar skulu rinda kostnaðin í sambandi við kanning, avbyrging og koppseting, fer eisini til teir føroysku myndugleikarnir. Tað sama er galdandi fyri tillagan av lóggávu fyri endurgjald orsakað av tvangsfyriskipanum sambært lóg.

Heimildir í aðrari lóggávu, sum er løgd til danskar myndugleikar, eru ikki fevndar av yvirtøkuni. Í tí sambandi kann greiða fáast á ivaspurningum í samráðingum partanna millum.

Í sambandi við yvirtøkuna verða gjørdar nakrar tillagingar av myndugleikabýtinum á farsóttarmálsøkinum, orsakað av teimum heimildum, sum føroysku myndugleikarnir fáa. Víst verður í hesum sambandi á løgtingsmál nr. xx/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum), sum verður lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskotið.

Í aðrar mátar stendur verandi lóggáva á økinum við, sbr. § 5 í yvirtøkulógini og sbr. § 13 í heimastýrislógini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við hesum lógaruppskoti verður farsóttarmálsøkið formliga yvirtikið. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar lóggávuvald og útinnandi vald á nevnda málsøki.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er sent til ummælis hjá Landslæknanum, Føroya Landfúta, Sjúkrahúsverkinum, Landsdjóralæknanum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, TAKS, Gjaldstovuni, Fiskimálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Heilsutrygd, Landsapotekaranum, Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu, Ílegusavninum, Fólkaheilsuráðnum, Sjúklingaráðnum, Læknafelagnum, Kommunulæknafelagnum, Felagnum Yngri Læknar, Ríkisumboðnum, Sundhedsstyrelsen, Styrelsen for Patientsikkerhed, Sundhedsministeriet, Statsministeriet, Finansministeriet, Transportministeriet, Justitsministeriet og Forsvarsministeriet.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur sent ummælisskriv, har boðað verður frá, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur sent ummælisskriv, har boðað verður frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan ongar viðmerkingar hevur til lógaruppskotini.

Forsvarsministeriet hevur viðmerkingar til § 15, stk. 2 í uppskoti til løgtingslóg um broyting í ymiskum lógum á heilsumálsøkinum (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum). Sambært uppskotinum verður skotið upp, at § 15, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Landsstyret kan fastsætte, hvilke lempelser der skal gælde for orlogsfartøjer og militære luftfartøjer." Forsvarsministeriet skjýtur upp, at hendan áseting verður broytt, so at ásetingin verður orðað soleiðis: Landsstyret kan, efter forhandling med forsvarsministeren, fastsætte regler om, hvilke lempelser der skal gælde for orlogsfartøjer og militære luftfartøjer.

Løgmansskrivstovan og Heilsumálaráðið hava svarað Forsvarsministeriet, at tað ikki verður mett møguligt at áseta heimild til militæran myndugleika í hesum lógaruppskotum um yvirtøku, av tí at militærlóggáva er eitt felagsmál, sum verður regulerað í ríkislóggávu. Uppskotið til broyting verður tí ikki tikið til eftirtektar. Svarskrivið til Forsvarsministeriet er hjálagt hesum lógaruppskoti.

Sjúkrahúsverkið hevur boðað frá, at Sjúkrahúsverkið tekur undir við málinum um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum.

Føroya Politi hevur boðað frá, at tey ongar viðmerkingar hava til lógaruppskotini.

Fólkaheilsuráðið vísir á, at tað í lógaruppskotinum, undir kapitlinum um fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur stendur, at tað ikki er sannlíkt, at smittuuppsporan verður tikin upp aftur í nærmastu framtíð. Tí verður ikki mett, at tað fara at standast útreiðslur av smittuuppsporan í sambandi við yvirtøkuna. Fólkaheilsuráðið heldur, at sum støðan er í løtuni, eigur hendan meting at verða endurskoðað.

Ílegusavnið hevur boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar til lógaruppskotini.

Sundhedsministeriet viðmerkir, at tað í sambandi við arbeiðið at yvirtaka farsóttarmálsøkið hava verið fleiri fundir ímillum Heilsumálaráðið og Sundhedsministeriet, umframt skrivligt

samskifti. Sundhedsministeriet boðar frá, at Heilsumálaráðið hevur tikið stóran part av viðmerkingunum hjá Sundhedsministeriet til eftirtektar. Sundhedsministeriet tekur undir við, at landslæknin framhaldandi verður partur av Farsóttarnevndini. Sundhedsministeriet metir tó, at tað í viðmerkingunum til lógaruppskotið um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum eigur at verða nágreinað, at talan er um yvirtøku av øllum pørtum av farsóttarmálsøkinum, umframt hvat tað nágreiniliga merkir, at føroyskir myndugleikar yvirtaka uppgávurnar hjá landslæknaembætinum. Hesar viðmerkingar eru ikki tiknar til eftirtektar, av tí, at tað í lógaruppskotinum um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum er nágreinað, at talan er um yvirtøku av øllum farsóttarmálsøkinum og av tí, at tað í lógaruppskotinum um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum og lógaruppskotinum um myndugleikaflytingar verður klárt nágreinað, hvørjar uppgávur føroyskir myndugleikar yvirtaka frá landslæknaembætinum.

Sundhedsministeriet metir, at tað í lógaruppskotinum um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum eigur at verða nágreinað, at heimildir, sum eru hjá donskum myndugleikum sambært aðrari lóggávu, ikki eru fevndar av yvirtøkuni. Mett verður ikki, at tað er neyðugt at nágreina hetta, av tí, at tað er greitt, at hetta lógaruppskotið bert fevnir um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum og fevnir sostatt ikki um aðra lóggávu.

Sundhedsministeriet upplýsir, at ministeriet metir, at yvirtøkan vil fáa týdning fyri blokkstuðulin og at ministeriet fer at venda aftur við nærri kvalificering av væntaðu lækkingini. Til hetta er at siga, at hetta longu er lýst í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið um yvirtøku av farsóttarmálsøkinum, undir kapitlinum um fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Í hesum kapitli stendur, at sum grundregla eigur næsta blokkstuðulsveiting, sum verður ásett við ríkislóg, at minka, tí at nú verður "Epidemi, vaccinationer og kønssygdomme" ikki longur ein partur av blokkstuðulsskipanini. Men, hvussu nógv blokkstuðulsskipanin skal minka, er ein tingingarspurningur millum føroyskar og danskar myndugleikar. Blokkstuðulin verður ásettur í aðrari lóggávu.

Viðv. lógaruppskotinum um myndugleikaflytingar, metir Sundhedsministeriet, at § 15, stk. 2 í verandi lóg eigur at verða varðveitt, soleiðis at landsstýrið eftir samráðing við danskar myndugleikar kann áseta reglur um, hvørjir lættar skulu vera galdandi fyri "orlogsfartøjer" og "militære fartøjer". Av tí, at hendan yvirtøkan fevnir um alt farsóttarmálsøkið, verður tað ikki mett at vera rætt, at partur av heimildunum at agera, tá ið ein farsótt leikar á, liggur hjá donskum myndugleikum. Hendan viðmerking er tí ikki tikin til eftirtektar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Føroyskir myndugleikar fara eftir yvirtøkuna at bera tær útreiðslur, sum standast av málsøkinum.

Landskassin ber longu flestu útreiðslurnar av farsóttarmálsøkinum sbr. § 28, stk. 1, í "anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme".

Tá ið farsóttarmálsøkið verður yvirtikið, verða tær uppgávur, sum Landslæknin hevur sambært epidemilógini, yvirtiknar. Ætlanin er, at Fólkaheilsustýrið skal loysa hesar uppgávur.

Mett verður, at Fólkaheilsustýrið skal seta ein lækna til at taka sær af farsóttarmálsøkinum v.m. Afturat læknanum má setast ein samskipari at hjálpa læknanum við at umsita økið. Umframt hetta verður mett, at neyðugt er at seta ein løgfrøðing hálva tíð í Heilsumálaráðnum at umsita lóggávuna á farsóttarmálsøkinum. Hetta fyri at tilevna nýggja føroyska farsóttarlóggávu, kunngerðir og vegleiðingar v.m. Talan er um stórt og umfatandi arbeiði. Afturat hesum kemur annar rakstur av økinum, so sum skrivstovuútgerð v.m. Samlaðar útreiðslur til yvirtøku av farsóttarmálsøkinum verða soleiðis mettar at vera 3 mió.kr. um árið.

Í tíðini undir korona stóðust útreiðslur av smittuuppsporan. Nógv fólk vórðu sett í starv hjá Landslæknanum, ið tóku sær av smittuuppsporan. Av tí, at smittuuppsporan ikki longur verður framd í sambandi við koronasmittuna, eru fólk ikki longur sett í starv hjá Landslæknanum at smittuuppspora, og starvsfólkaútreiðslurnar til hetta eru tí ongar. Ongi starvsfólk skulu tí flytast frá Landslæknanum til føroyskar myndugleikar. Mett verður ikki, at tað er sannlíkt, at smittuuppsporan verður tikin upp aftur í nærmastu framtíð. Tí verður ikki mett, at tað fara at standast útreiðslur av smittuuppsporan í sambandi við yvirtøkuna.

Sum grundregla eigur næsta blokkstuðulsveiting, sum verður ásett við ríkislóg, at minka, tí at nú verður "Epidemi, vaccinationer og kønssygdomme" ikki longur ein partur av blokkstuðulsskipanini. Men, hvussu nógv blokkstuðulsskipanin skal minka, er ein tingingarspurningur millum føroyskar og danskar myndugleikar. Í nógv ár hava útreiðslurnar av farsóttarmálsøkinum verið sera lítlar, tí at ongar farsóttir hava verið. Tað er bert vaksinatiónsútreiðslurnar, sum hava havt kostnað við sær. Áðrenn korona vóru tær um 3 mió.kr. árliga. Í 2022 verða tær mettar til góðar 8 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Flestu uppgávurnar á farsóttarmálsøkinum liggja longu hjá føroyskum myndugleikum. Tað snýr seg um kanningar og viðgerð av smittandi sjúkum, vaksinatiónir og at útvega býli til teirra, sum skulu avbyrgjast vegna smittuvanda.

Eftir yvirtøkuna fara føroyskir myndugleikar at taka sær av øllum størvum Landslæknans, sum hava tilknýti til málsøkið. Landslæknin verður tó framhaldandi limur í farsóttarnevndini. Aftaná yvirtøkuna fer serliga Fólkaheilsustýrið at taka sær av viðurskiftunum kring farsóttarmálsøkið.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar umsitingarligar avleiðingar við sær, so sum avleiðingar fyri vinnuna, kommunur, umhvørvið, serstøk øki í landinum, avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur, ella sosialar avleiðingar, av tí, at einasta broyting á økinum er, at myndugleikin nú gerst føroyskur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention". Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap".

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri plass ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Við hesi grein verður alment kenda heitið, Ræðislógin, sett inn í løgtingslógina sum eitt formligt stytt heiti.

Til § 1, nr. 2
Við hesi grein verður yvirtøkan av farsóttarmálsøkinum formliga framd.

Til § 2
Gildiskoman er ásett til 1. mai 2023. Á henda hátt ber til at fáa játtan til vegar á fíggjarlógini 2023, og síðani í januar 2023 at søkja eftir lækna v.m. til Fólkaheilsustýrið at røkja uppgávuna: smittandi sjúkur.

Løgmansskrivstovan, tann 16. august 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

/ John Rajani

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Forsvarsministeriet
Fylgiskjal 5: Svarskriv til Forsvarsministeriet
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Sjúkrahúsverkinum
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Føroya Politi
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Fólkaheilsuráðnum
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Ílegusavninum
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Sundhedsministeriet